# KÆRLEIKIN KENNIR ONGAR GJÁIR

**PARLAG** Túsundtals kilometrar í fjarstøðu. Ein býur við 7 mió íbúgvum og ein lítil føroysk bygd við bert 40 fólkum. Tvær sera ymiskar mentanir. Tveir heilt ymiskir hugsunarhættir. Tvey fullkomiliga ymisk mál. Og eini eldri sethús við Gjógv. Av sonnum EIN GJÓGV á muni. - Hóast tað er bítandi kalt og nógvur kavi uttanfyri í dag, trívist eg væl her norðuri, sigur 25 ára gamla Sammy Zhang úr Kina

Snorri Brend

**Gjógv:** Uttanfyri sethúsini her Eysturi á Veg nr. 6 stendur ein bilur í túninum.

Inni í gomlu sethúsunum húsast eitt ólíkt par. Hon úr Kina. Hann úr Føroyum. Tað er kortini eitt, ið bindur tey bæði, Sammy og Harry saman: Kærleikin til hvørt annað.

Tey hittust fyrstu fer í heimbýi hennara Dong Guang í 2006, og búgva nú í norðastu bygdini í Eysturoynni.

Hon hevur júst fingið uppihaldsloyvi í Føroyum, og kann nú byrja at leita sær eftir einum arbeiði. Trupulleiki hennara er, at hon ikki tosar føroyskt.

Og hetta gevur henni ávísar avmarkingar: Møguleika fyri arbeiði; fyri at sleppa av bygdini; fyri at samskifta við onnur.

– Ja, eg havi bara eitt kinverskt koyrikort, og tað kann ikki brúkast her. Skal eg taka eitt føroyskt koyrikort, má eg fyrst læra meg føroyskt.

– Tað vildi eg fegin. Men eg kundi eisini hugsað mær at lært meg danskt, tí kanska fara vit at flyta hagar einaferð.

– Men fyribils trívist eg her við Gjógv. Her er fínt at búgva, ja, er besta stað á jørð - enn, í hvussu so er, sigur Sammy við einum brosi.

### Úr skúlanum

Tá ein tosar við ungfólk í dag, fellur prátið ofta inn á útbúgving og møguleikar fyri góðum starvi. Men her kann Sammy ikki rættiliga tosa við, tí sum hon sigur: - Mín læra er lítil. Eg gekk bert 6 ár í skúla.

Hon vaks upp í eini vanligari familju, har jørðin var álitið. Hon átti tvey eldri systkin, sum gingu í skúla og tvey yngri systkin. Støðan var bara hon, at familjan hevði ikki ráð at lata øll fimm ganga í skúla.

– Eg hevði faktiskt einki annað væl enn at gevast, hóast eg elskaði at ganga í skúla. Tey bæði eldru fóru í hægri skúla, og so máttu foreldrini sjálvandi gjalda meiri fyri tað.

– Eg valdi tí at gevast í skúlanum, soleiðis at tað kundi ganga betri hjá yngru systkjunum hjá mær. Tja, eg mátti bara gera tað, hóast eg lærdi væl í skúlanum, greiðir Sammy frá.

### Pengar til familjuna

Sammy var bert 13 ár gomul, tá hon fór úr skúlanum. Men hon var heppin og fekk arbeiði sum húshjálp í einum heimi tey næstu trý árini.

Trupulleiki hennara var kortini hann, at til bar ikki fáa eitt rættiligt arbeiði, fyrrenn hon var 16 ára gomul.

Skipanin í Kina var nevniliga hon, at ein fær ikki sítt sannleikaprógv fyrrenn ein hevur rokkið hesum aldri. Hetta gevur somuleiðis atgongd til arbeiðsmarknaðin.

*Framhald á næstu síðu*

> **Eg vildi fegin kunnað lært meg føroyskt eisini, soleiðis at eg kann tosa meiri við fólkið her í bygdini**

## Fitt par

Onkur vildi kanska hildið, at eingin fremmandur kann trívast í eini so lítlari og fjarskotnari bygd sum við Gjógv. Tað fær eingin Sammy at skriva undir uppá. Hon trívist her, hóast hon einki arbeiði hevur fingið enn. Hon fær ístaðin gerandisdagin at ganga við at lesa enskar bøkur, soleiðis at hon kann læra seg hetta málið enn betri. Ella hon situr við telduna, har hon millum annað kann hava samband við systkin síni í Kina umvegis Skype.

– Eg vildi fegin kunnað lært meg føroyskt eisini, soleiðis at eg kann tosa meiri við fólkið her í bygdini, sigur Sammy, og vísir til eitt eldri par, sum býr beint við hjá henni. Tíverri fyri hana og tíverri fyri tey, duga tey ikki at tosa enskt. Tá tey so møtast og heilsast verður tað bert til eitt lítið halló og so einki meiri.

– Eg haldi, at tað er so keðiligt, at vit ikki kunnu tosa ordiliga saman, tí tey síggja út til at vera bæði fitt og blíð, sigur hon.